Bólkarnir, UEFA Champions League

Endaliga stø›an í teimum átta bólkunum í fyrra bólkaspælinum

Bólkur A

	f	m	s
Real Madrid	15	8	13
Sp. Moskva	9	3	12
Leverkusen	9	12	7
Sporting	5	15	2

Bólkur B

	f	m	s
Arsenal	11	8	13
Lazio	13	4	13
Shakhtar D.	10	15	6
Sparta Prag	6	13	3

Bólkur C

	f	m	s
Valencia	7	4	13
Lyon	8	6	9
Olympiakos	6	5	9
Heerenveen	3	9	4

Bólkur D

	f	m	s
Sturm Graz	8	11	10
Galatasary	10	13	8
Rangers	10	7	8
Monaco	13	10	7

Bólkur E

	f	m	s
Deportivo	6	4	10
Panathinaikos	6	5	8
Hamburger	9	9	6
Juventus	9	12	6

Bólkur F

	f	m	s
Bayern M.	9	4	11
Paris St. G.	14	9	10
Rosenborg	13	15	7
Helsingborg	6	14	5

Bólkur G

	f	m	s
Anderlecht	11	14	12
Man. United	11	7	10
Eindhoven	9	9	9
Dynamo Kiev	7	8	4

Bólkur H

	f	m	s
AC Milan	12	6	11
Leeds United	9	6	9
Barcelona	13	9	8
Besiktas	4	17	4

Úrslit

Spartak-Madrid	1-0
Shahktar-Arsenal	3-0
Sparta Prag-Lazio	0-1
Lyon-Olmpiakos	1-0
Valencia-Heerenv.	1-1
Galatasary-Sturm	2-2
Rangers-Monaco	2-2
Hamburg-Deportivo	1-1
Panath.-Juventus	3-1
Helsingborg-Paris	1-1
Rosnborg-Bayern M.	1-1
Man. Utd.Dynamo	1-0
Eindh.-Anderlecht	2-3
Milan-Leeds	1-1
Barcelona-Besiktas	5-0

Gyltu skógvarnir handa›ir

Malenda Josephsen og Súni Frí›i Johannesen fingu mikudagin handa› gyltu skógvarnir, sum Thomas Dam Ítróttur letur bestu málskjúttunum hjá kvinnum og monnum

TOPPSKJÚTTAR
Jákup Mørk

Seinnu árini hevur ta› veri› fastur táttur, at Thomas Dam Ítróttur í samstarvi› vi› Sosialin hevur lati› bestu málskjúttunum í fótbólti gyltar skógvar.

Í ár gjørdust ta› ávíkavist Malena Jospehsen úr KÍ og Súni Frí›i Johannesen úr B68, sum fingu hendan hei›urin, men serliga hjá Súna Frí›a stó› nógv á. Undan seinasta dystinum móti GÍ var hann tvey mál aftan fyri li›felagan, Marcello, men vi› einum hattricki í tí dystinum, smoygdi hann sær fram um brasiliumannin.

Skuldi prógva seg sjálvan

Sjálvur sigur Súni Frí›i, at sum so leggur hann ikki so nógv í, hvør skj‡tur málini. Hann vi›gongur tó, at hann í seinasta dystinum hugsa›i eitt sindur um hetta, og at hann eisini er fegin um at fáa gylta skógvin.

– Ta› er sjálvandi ein lætti, at man solei›is prógvar, at B68 gjørdi rætt, tá teir undan kappingini gjørdu sáttmála vi› meg. Eg hev›i tí naka› at prógva, og eg eri fegin um at hava liva upp til vónirnar.



Tey bæ›i Malena Josephsen og Súni Frí›i Johannesen fáa her handa› gyltu skógvarnar frá umbo›num hjá Thomas Dam Ítrótti, Rúna Nolsøe. Rúni gjørdist annars sjálvur ársins leikari hjá monnum í ár, me›an Malena vann hei›urin hjá kvinnunum

Mynd: Álvur Haraldsen

Um loynidómin aftan fyri nógvu málini, sigur Súni Frí›i, ta› fyrst og fremst er li›num at takka.

– Hava vit ikki eitt gott li›, so fái eg fáar møguleikar, so ta› hongur sjálvandi saman.

Gylt ár hjá Malenu

Tá vit spurdu Malenu sama spurning, svara hon í fyrstu atløgu, at ta› sum sagt er ein loynidómur. Kanska er ta› heldur ikki so gott, um mótstø›uli›ini fáa hendan at vita.

– Nei, ta› má vera ein blanding av fleiri lutum. Gó›ar li›felagar og hepni munnu vera t‡dningarmestu lutirnir í hesum, sigur Malena.

Umframt at vinna gylta skógvin, gjørdist Malena eisini ársins leikari í kvinnudeildini, og saman vi› KÍ-li›num vann hon bæ›i lands- og steypakapping. Eitt betri kappingarár ber neyvan til at ímynda sær.

Tvey av teimum stóru úti

Fyrra bólkaspæli› í meistarakappingini er nú av, og í onkrum av bólkunum gjørdist talan um óvænta›ar endastø›ur

UEFA CHAMPIONS-LEAGUE
Jákup Mørk

Mest óvænta› mundi tann vera tann sannroynd, at bæ›i Juventus og Barcelona longu nú hava takka fyri seg í fínastu europeisku kappingini.

Barcelona kann um ikki anna› troysta seg vi›, at teir nú skulu royna seg í UEFA-cup kappingini. Hetta tí teir gjørdust nummar tr‡ í sínum bólki.

Gamla italska daman, Juventus, er hinvegin heilt úti í kuldanum, eftir at teir á útivølli máttu lúta fyri grikska Panathinaikos. Javnleikur hev›i annars veri› nóg miki› hjá italska stórfelagnum, og rokna› var› eisini vi›, at teir fóru at røkka hesum, solei›is sum italiumenn altí› plaga at lirka seg ígjøgnum.

Javnleikur var væntandi

Hjá Barcelona vóru treytirnar ø›rvísi, og undan seinasta dystinum vóru fleiri, sum rokna›u vi›, at teir máttu taka til takkar vi› tri›ja plássinum í bólkinum.

Ta› var nevnliga framman undan greitt, at ein javnleikur ímillum AC Milan og Leeds United vildi vi›ført, at tey bæ›i li›ini komu ví›ari, og so var eisini. So hjálpti ta› líti›, at Barcelona í sínum dysti vann heili 5-0 á Besiktas.

Røddir vóru annars frammi undan dystinum, at talan kanska fór at ver›a um avtala› spæl millum Milan og Leeds, men var hetta sannleikin, var› hann í øllum førum væl krógva›ur. Leeds tók nevnliga heldur óvænta› lei›sluna í dystinum, men eftir at Milan í seinna hálvleiki hev›i javna›, doy›i dysturin. Hvørgin parturin vildi ofra eitt trygt atgongumerki í royndunum at vinna dystin.

Bólkur D á høvdinum

Samanlagt mundi mest óvænta›a endastø›an helst vera í Bólki D. Undan bólkaspælinum, og eisini eftir teir bá›ar fyrstu dystirnar av bólkaspælinum, var› rokna› vi›, at bólkurin fór at síggja solei›is út: Monaco, Rangers, Galatasary, Sturm Graz. Og hvat hendi so? Alt var› vent fullkomuliga á høvdi›, og skotarnir úr Glasgow máttu enn einafer› taka til takkar vi›, at í europeiskum høpi eru teir eftirbátar.

Seinasta plássi›, sum spenningur var um mikukvøldi›, var í bólki G, har Manchester United undan dystinum móti Dynamo Kiev hev›i ryggin móti múrinum. Onglendingarnir skuldu vinna, og hetta eydna›ist teimum eisini vi› einum máli frá Teddy Sheringham tí›liga í fyrra hálvleiki. Eftir hetta settu teir rey›u devlarnir fer›ina ni›ur, og í roynd og veru var ta› um reppi›, at Dynamo Kiev javna›i, men teir misn‡ttu risamøguleika bert fimm minuttir fyri leiklok.

VI‹MERKINGAR

»Trygdin í vanda«

Tí›indaskriv

»Trygdin í vanda «, sigur landst‡risma›urin í Fiskivinnumálum í leygardagssosialinum. At fiskimálaráharrin nú fer at tosa um trygd, tí eitt skip fyri 100 mill. kr. liggur í Noregi, tykist Maskinmeistarafelagnum heldur løgi›. Felagi› hevur í fleiri ár strongt á, at tey lógarkravdu førleikakrøvini á sjónum vór›u hildin av myndugleikunum, solei›is at trygdin var› sett í hásæti, men ta› hevur veri› sum at sletta vatn á gás.

Vit hava tíverri nógv dømi um, at myndugleikin er skjótur at slaka í sínum egnu lógarásettu krøvum, hó›ast Maskinmeistarafelagi› hevur mælt frá, júst vi› atliti at trygdini hjá manning og skipum.

Fiskimálaráharrin umsitur hesi málsøki› eisini, men ta› hevur kanska ikki so stóran áhuga, tí ta› fer eisini at raka rei›ararnar.

Spæla vi› trygdini

Um nakar hevur spælt vi› trygdini hjá sjófólki, eru ta› politikararnir og landsst‡rini, sum hava umsiti› Vaktar-og Bjargingartænastuna tey seinastu árini.

Teir hava fleiri fer›ir “selt skinni› á›renn bjørnin er skotin”. Fyrst seldu teir ÓLAV HALGA fyri spottprís uttan at hava anna› skip klárt. Harnæst keyptu teir NÓLSOYAR PÁLL, sum ongantí› fekk loyvi› til at sigla. Sí›ani vór›u fyrst NIM og so GORM leiga›ir - hvørgin teirra egna›ur til endamáli› - og at enda var› GORM sendur av landinum á›renn vi›urskiftini vi› BRIMLI vóru komin uppá pláss. At ein landst‡risma›ur sí›ani fer at geva fakfeløgunum skuldini fyri væntandi trygd, tí at tey ikki vilja gó›taka hvat sum helst frá Fíggjarmálast‡rinum, er heilt burturvi›.

Ta› sær út til, at Landsst‡ri› heldur seg vera einará›andi part í hesum máli og at teirra harrabo›um skulu øll rætta seg eftir.

Landsst‡ri› hevur goldi› kvarta mill. kr. fyri at fólk kundu fer›ast til Noregs at vera vi› til at doypa BRIMIL og løgtingi› hevur játta› hálva mill. kr. fyri at sjómansskúlanæmingar kundu fáa siglingstí› vi› ø›rum skipi, so ta› sær ikki út til, at ta› er peningamangul hjá Landsst‡rinum.

BRIMIL – jólatrøll ella n‡ggjur Nólsoyar Páll ?

Fagfeløgini hava fullan rætt til at nokta limum sínum at sigla vi› BRIMLI so leingi eingin sáttmáli er. At siga, at fakfeløgini seta seg upp ímóti landsins myndugleikum er eisini heilt burturvi›, tí okkum vitandi er demokratii› framvegis galdandi í Føroyum.

Um BRIMIL ver›ur jólatrøll ella ein n‡ggjur NÓLSOYAR PÁLL kann bert tí›in vísa.

Tórshavn, 07.11.2000
Vegna Maskinmeistarafelagi›
Finnleif Guttesen
forma›ur

savnsmynd

Tjó›

Zakarias Wang



Mikudagurin tann 25. oktober 2000 fer at vera ein minniligur dagur í føroysku søguni.

Tá hev›i danski forsætisrá›harrin bo›a› landsst‡rinum frá, at hann ikki helt, at føroyingar vóru ein tjó›. Føroysku andstø›uflokkarnir, sum higartil hava liti› á, at danski forsætisrá›harrin er teirra vælvildarma›ur, vóru vi› í einum or›askifti í útvarpinum. Spennandi var, hvat i› teir nú fóru at siga. Fóru teir at standa sum menn ímóti donsku stjórnini, ella fóru teir at dvína og siga ta›, at danska stjórnin hev›i rætt í hennara uppáhaldi um, at vit vóru ein partur av tí donsku tjó›ini?

Serliga var ta› spennandi at hoyra hvat i› javna›arflokkurin fór at siga. Tá i› heimast‡risskipanin kom eftir kríggi›, hev›i javna›arflokkurin ført fram, at tann føroyska og danska tjó›in vóru javnbjó›is, og grundgeving hansara fyri at seta heimast‡risskipanina í verk var tann, at henda skipanin vi›urkendi hetta sjónarmi›. Fór hann nú at vera meira bundin av danska javna›arflokkinum enn av egnu sjónarmi›um sínum?

Men javna›arflokkurin stó› royndina. Jóannes Ejdesgaard helt fast vi› floksins stø›u eisini tá ta› vísti seg, at hann harvi› kom at ganga beint ímóti donsku javna›arstjórnini.

Minni orsøk var at rokna vi› sambandsflokkinum. Tá heimast‡rislógin kom, vildi hesin flokkur ikki taka or›i› tjó› í sín munn um føroyingar, men noyddist vi› ringum tannabiti at lata um seg ganga at or›i› kom í heimast‡rislógina. Nú Nyrup royndi at avtaka ta føroysku tjó›ina var fryktandi fyri, at sambandsflokkurin fór at fegnast um, at hann nú hev›i fingi› ein vi›haldsmann á hægstu rók í danska statinum.

Men hvat hendi? Edmund Joensen vísti seg sum ein rættan mann og gekk beint ímóti tí sum danski forsætisrá›harrin hev›i sagt. Edmund seg›i, at ta› var eingin sambandsma›ur, sum iva›ist í, at føroyingar vóru ein tjó›.

Ta› sum her vísti seg var tí ta›, at føroyingar stó›u sum ein ma›ur ímóti einari danskari stjórn, sum er farin undir at leggja okkum inn undir ta donsku tjó›ina.

Summi halda, at ta› eingin orsøk er til at halda fólkaatkvø›u um henda spurningin, hvørt vit eru ein tjó› ella ikki, tí vit øll eru samd um ta›.

Hertil er at siga, at av tí at danska stjórnin ikki er samd vi› okkum í hesum máli, er øll orsøk til hjá okkum at gera vart vi›, at ta› ikki bert eru nakrir tilvildarligir politikarar, sum eru komandi og farandi, sum hava hesa stø›u, men at henda ásko›an hevur djúpar røtur í fólki okkara.

Vi› at danska stjórnin s‡tir fyri, at føroyingar eru ein tjó›, so hevur hon vi› einum høggi tiki› alla skor›ur undan heimast‡risskipanini. Løgtingi› samtykti einmælt tann 21/3 1947, at n‡ggja skipanin skuldi leggja út frá tí grundarlagi, sum Føroyar tá høvdu.

Hvat hetta grundarlag var, er ta› sum eg havi greitt frá í bókini Føroyar á vegamóti. Ta› ber í hvussu er ikki til at siga, at vit nakrantí› hava veri› undir Danmark, ella at danskir myndugleikar kunnu delegera naka› vald til føroyska heimast‡ri›. Vit vóru í 1947 eitt egi› land, sum hev›i sín egna statsrætt. Føroyska tjó›in kundi í tann mun hon vildi ta› lata a›rar gera ta› praktiska arbei›i, men hetta var vegna ta føroysku tjó›ina.

Ta› er rætt, at tá i› ta› kemur til uttanríkismál, so er føroyska tjó›in ikki óheft, tí vit hava ein sáttmála vi› donsku tjó›ina um at vit eru saman í kríggi. Men ta› sama ger seg galdandi fyri ta donsku tjó›ina. Hon er heldur ikki óheft, tí hon hevur vi› sama sáttmála bundin seg at okkum í uttanríkispolitiskum málum. Ta› er tí sum javna›arflokkurin seg›i í 1947: Vit eru javnbjó›is tjó›ir.

Ta› danska stjórnin gjørdi vi› sáttmálanum um minnilutamál var tí at ryggbróta heimast‡risskipanini. Eingin hev›i ímynda› sær, at danska stjórnin ímóti tí grundleggjandi sáttmálanum millum partarnar fór at taka uttanríkispolitisk stig, sum hin parturin beinlei›is var ímóti.

Men ta› gjørdu teir, og nú kemur so hetta afturat, at teir vilja leypa frá teimum grei›u or›unum í heimast‡rislógini um at vit eru ein tjó›.

Samstundis sigur Nyrup, at eru vit ikki samdir um alt, so eru vit ikki samdir um naka›!

Vanliga reglan er, at ver›ur ein áseting í einum sáttmála brotin, so er avlei›ingin av hesum, at allur sáttmálin fer úr gildi. Tá danska stjórnin fer fram á henda hátt vi› tí sáttmála, hon hevur gjørt vi› okkum, so er bert eitt at gera, og ta› er at fáa fólksins undirtøku fyri at danska stjórnin her er farin út um mark.

Ta› var hetta, sum Jóannis og Edmund gjørdu greitt tann 25. oktober, ta› hava teir uppibori› allan hei›ur fyri.

Hetta er atvoldin til, at ta› er rætt at hava eina fólkaatkvø›u sum skjótast, har vit sleppa at siga frá, at vit eru samdir vi› okkara oddamenn í hesum spurningi.

Barnaansing og ungdómspolitikkur

Tummas Eli H. Joensen

Sum samfelagi› er samansett, liva flestu føroyskar familjur av tveimum inntøkum. Tí er ney›ugt, at barnaansingin er so væl fyriskipa›, at foreldrini eru væl nøgd vi› skipanina, hvør hon so enn er.

Dagrøktin kann ví›kast og fáa betri umstø›ur at virka undir. Ein ví›kan av dagrøktarskipanini kundi veri›, at møguleikar vóru til frítí›arskúla. Børnini, i› ganga í 1. og 2. flokki eru sum er, í dagrøkt aftaná skúlatí›. Men betur var um tey kundu fari í ein frítí›arskúla; vegna ta›, at aldursmunurin á børnunum 1. og 2. flokki og tey minstu í skipanini er so stórur, hev›i hetta veri› ein betran av skipanini. Ein spælistova er eisini eitt, i› skal vera í einari dagrøktarskipan, annars ver›ur trubult at fáa skipanina at virka á besta hátt. Alternativi› er, at barnagar›ur ver›ur bygdur.

Umrá›andi er tó, at loysnin i› ver›ur vald, liggur innanfyri fíggjarorkuna hjá kommununi. Kannast má eftir, hvat i› loysir seg best hjá bæ›i kommununi og hjá foreldrunum.

Sjóvar Kommuna er væl



fyri, tá haugsa› ver›ur um bygdahúsi› og tey tilbo›, i› har kunnu gevast okkara fólki. Her kundi veri› onkur samskipan av aktivitetum til ungdómin, solei›is, at tey i› kanska ikki hava so stóran áhuga fyri ítrótti, eisini kundu fingi› okkurt tilbo›, tó alt gott um ítróttin og skal hann eisini hava gó›ar umstø›ur at virka undir.